

# Dreymurin sum gjørdist til marru

**Eystari Landsrættur staðfesti í gjár dómin í Føroya Rætti sum sigur, at keypssáttmálin millum Páll og Kristinu á Reynatúgvu og Anfinn Rubek Nielsen stendur við. Tað er tí greitt, at Anfinn Rubek Nielsen skal gjalda tær 2,75 milliónirnar, sum sáttmálin sigur**

Leo Poulsen

Tað var ein stórfingin ætlan, sum Páll og Kristina á Reynatúgvu kveiktu fyri nøkrum árum síðani. Tað skuldi byggjast ein golfvøllur á Sandoynni, og gjøgnum nøkur ár høvdu tey bæði uppkeypt rættiliga fitt av jørð til endamálið.

Hugsanin var, at byggja ein níggju hol golfvøll, og hartil skuldi eisini byggjast ein smáttubýur við tíggjutals smáttum í trimum støddum, sum ætlanin var at leiga út til golfglað ferðafólk.

Páll á Reynatúgvu og Anfinn Rubek Nielsen kendust væl og vóru saman til høgtíðir, føðingardagar og líknandi. Teir komu á prát um golfverkætlanina og Anfinn Rubek Nielsen gjørdist skjótt áhugaður.

Teir báðir byrjaðu at tosa um møguleikan fyri at Anfinn Rubek Nielsen kundi keypa seg inn í verkætlanina, men tað skuldi samráðingar til fyri at finna fram til prísin.

Páll á Reynatúgvu og konan vildu hava fimm milliónir krónur fyri at selja Anfinni Rubk Nielsen part av jørðini, sum skuldi vera ítøkiligi luturin hjá Anfinni Rubek Nielsen í golfverkætlanini. Men hetta helt Anfinn Rubek Nielsen vera í meira lagi.

Páll og Kristina á Reynatúgvu mettu hinvegin, at tey høvdu lagt so nógva orku í verkætlanina, at tað var ikki meiri enn rímiligt.

Tað endaði kortini við, at teir samdust um ein prís á 2,75 milliónir krónur. Men hesin keypssáttmáli var skorin fyri allar aðrar ásetanir enn tær reint matrikuleru. Har stóð tí einki í keypssáttmálanum um golfverkætlanina.

## Kaldar føtur

Hesin sáttmálin varð so undirskrivaður 20. august 2008, og síðani varð arbeitt víðari við verkætlanini.

Eitt av málunum, sum skuldi avgreiðast var, at fáa partin í haganum frámatrikuleraðan, og í tí sambandi var grannastevna hildin um málið. Stórur partur av eigarunum tóku undir við at frámatrikulera hetta økið, og tí var komið framvið tí snávingarsteininum.

Eisini høvdu hjúnini á Reynatúgvu søkt bygdarráðið á Sandi um loyvi til at byggja golfvøll. Hetta málið var ikki avgreitt av bygdarráðnum, men tey høvdu fingið munnliga tilsøgn.

Men nú byrjar Anfinn Rubek Nielsen eftir øllum at døma at fáa kaldar føtur.

## Anfinn Rubek Nielsen valdi at taka ein kjans

Hann vil ikki skriva undir endaliga skeytið, og vil taka seg úr verkætlanini.

Og so tekur ósemjan seg upp.

Hendan ósemjan um treytaða skjeytið endar við, at Páll og Kristina á Reynatúgvu draga Anfinn Rubek Nielsen í rættin fyri at halda honum fast til undirskrivaða keypssáttmálan, ella treytaða skeytið, sum skjalið varð umrøtt í rættinum.

Føroya Rættur kom til ta niðurstøðu, at undirskriftin hjá Anfinn Rubek Nielsen var bindandi, og at hann tískil skuldi gjalda Páll og Kristinu á Reynatúgvu tær 2,75 milliónir krónurnar.

## Økið óegnað

Hesa avgerð í Føroya Rætti vildi Anfinn Rubek Nielsen ikki góðtaka og skjeyt hann tí málið inn fyri Eystara Landsrætt.

Málið kom so fyri í Eystara Landsrætti mikudagin í farnu viku.

Anfinn Rubek Nielsen greiddi frá, at hann ikki reiðiliga visti, hvat hann skrivaði undir upp á, og at hann ikki skilti, hvat eitt treytað skeyti var. Hann helt í heila tikið, at hann hevði skrivað undir skjeytið undir følskum fyritreytum, tí har var í veruleikanum eingin verkætlan.

Páll á Reynatúgvu gjørdi hinvegin greitt, at verkætlanin var har, og at teir báðir ofta høvdu tosað um golfvøllin og smáttubýin. Hann viðgekk, at ongar ítøkiligar tekningar vóru, men tað visti Anfinn Rubek Nielsen útmerkað av.

Sakførarin hjá Anfinn Rubek Nielsen hevði kallað inn Janus Norðberg sum serfrøðing í golf. Janus hevur – umframt at vera íðin golfspælari – eisini eina eitt ára útbúgving í Skotlandi í »golf management«.

Janus Norðberg greiddi frá, at útstykkjaða øki var als ikki egnað til ein golfvøll. Hann segði, at økið var alt ov smalt, og at tað bara lat seg gera at leggja eitt hol í hvør sínum enda av økinum. Pettið ímillum var alt ov smælt. Hann segði eisini, at økið lá alt ov nær landsvegnum millum Sand og Skopun, og at tað tí fór at vera ógjørligt at fáa loyvi, at leggja golfvøllin har.

## Undirskriftin bindandi

Undir proseduruni segði sakførarin hjá Anfinn Rubek Nielsen, at tað var týðiligt, at eingin verkætlan fyrilá, og at klientur hennara tí hevði skrivað undir skjeytið undir følskum fortreytum.

Hon legði næstan tey bæði, Páll og Kristinu á Reynatúgvu, undir at hava snýtt Anfinn Rubek Nielsen. Hon segði, at Páll á Reynatúgvu hevði selt eina verkætlan, sum hann ikki átti.

Sakførarin hjá Páll á Reynatúgvu visti hinvegin á, at Anfinn Rubek Nielsen útmerkað væl visti av, at verkætlanin enn bert var eitt hugskot. Hann segði, at Anfinn Rubek Nielsen hevði valt at gera eina íløgu, og sum við so nógvum øðrum íløgum var henda eisini bundin við einari ávísari óvissu. Anfinn Rubek Nielsen valdi at taka ein kjans, segði sakførarin hjá Páll og Kristinu á Reynatúgvu.

Teir tríggir dómararnir í Eystara Landsrætti søgdu dómin í gjár, og hann gjørdist ein staðfesting av dóminum í Føroya Rætti.

Anfinn Rubek Nielsen skal sostatt gjalda tær 2,75 milliónirnar soleiðis sum skjeytið ásetur, og umframt hetta skal hann gjalda 50.000 krónur til Páll og Kristinu á Reynatúgvu fyri sakføraraútreiðslur og annað.

Tað kann sostatt staðfestast, at dreymurin um ein golfvøll gjørdist til eina marru – í hvussu er fyri Anfinn Rubek Nielsen.

*Veitst tú eina søgu, send so SMS á 28 50 04*